# 15 ár síðan undirgru



*Atli P. Dam, løgmaður, og Poul Schlüter, forsætismálaráðharri, hava júst undirskrivað avtaluna um yvirtøku av málsøkinum ráevni í undirgrundini. Sjálv avtalan varð undirskrivað í Tinganesi tollaksmessudag 23. desember 1992*



STATSMINISTERIET

Den 11. september 1992.

PRESSEMEDDELELSE

Der er i dag truffet principiel aftale mellem regeringen og Færøernes landsstyre om at sagsområdet "Råstoffer i undergrunden" overgår til Færøsk særanliggende. Dette indebærer, at hjemmestyret får den fulde lovgivende og administrative myndighed samt afholder alle fremtidige udgifter på området.

Det er aftalt, at eventuelle indtægter fra fremtidig råstofindvinding vil udløse forhandlinger om nedsættelse af statens tilskud til Færøerne.

Der vil herefter snarest muligt blive udfærdiget en skriftlig aftale efter de nævnte retningslinier.

*Tíðindaskrivið frá donsku stjórnini tann 11. september 1992*

**Týsdagin 11. september eru leiðin 15 ár síðan undirgrundin kom á føroyskar hendur. Størsta hending í føroyskari politiskari søgu, segði Atli P. Dam, táverandi løgmaður, um avtaluna**

UNDIRGRUND
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá vit nevna 11. september, verður fyri tað mesta hugsað um søguliga lagnudagin, tá yvirgangsfelagsskapurin Al-Qaeda leyp á World Trade Center og Pentagon í USA tann 11. september í 2001.

11. september er eisini ein søguligur dagur her hjá okkum. Hendan dagin í 1992, fyri 15 árum síðan, varð avtala gjørd millum Atla P. Dam, táverandi løgmann, og Poul Schluter, táverandi forsætismálaráðharra í Danmark, um at føroyingar kundu yvirtaka føroysku undirgrundina. Teir, sum vóru við til samráðingarnar hendan dagin, vóru umframt løgmann eisini Jógvan Sundstein, fíggjarmálaráðharri, Svend Åge Ellefsen, orkumálaráðharri, og Halgir Winther Poulsen, formaður í donsk-føroysku samráðingarnevndini um undirgrundina. Fyri donsku stjórnina vóru umframt Poul Schluter eisini Uffe Ellemann Jensen, uttanríkismálaráðharri, Anne Birthe Lundholt, orku- og ídnaðarmálaráðharri, Wiese, skrivstovustjóri, og Inger Skytsgaard frá danska partinum í samráðingarnevndini um undirgrundina.

Í tíðindaskrivi frá donsku